# Háð og spott av Løgmanni og Statsministara í SvF

ROLF GUTTESEN



**Sum ikki einaferð røkir SvF gamlar mytur. Tað er ikki uppgávan hjá einum "public service" miðli at servera gamalt tvass. Sendingin "Dagur og Vika" tann 28.2.07 eitt keðiligt dømi um, at journalisturin ikki dugdi síni ting, og at sjónvarpið, sum stovnur, ókritiskt bar hansara møsn víðari.**

Eg skal endurgeva tað, sum sjónvarpsmaðurin segði í hasi vanlukku sending, hóast ikki var tað nógv. Sum upplegg til sjónleikin, meðan kameraið panorerar yvir Kongabrúnna og Fútastovu, fortelur journalisturin okkum hetta:

***"Íslendska flaggið fer skjótt at veitra yvir Fútastovu. Men í Reykjavík kann føroyska flaggið ikki veitra yvir føroysku sendistovuni. Nei, har skal Dannebrog vindast á stong."***

**Ivasamur leiklutur hjá SvF**

Hesin stutti setningur er fyltur við feilum úr enda í annan.

1. Fyri tað fyrsta er tað einki nýtt, at Ísland hevur havt konsulat í Havn, og at íslendska flaggið hevur veitrað har. Fyrst í Tróndargøtu, har Trygve Samuelsen var konsul. Síðani úti við skipasmiðjuna, tá Mohr fekk heiðurin at vera konsul hjá Lýðveldinum Ísland.
2. Í næsta setningi verður komandi føroyska umboðið í Íslandi kallað "sendistova". Tað føroyska orðið sendistova merkir í dag vanliga ambassada. Og Føroyar, sum ein partur av Ríkisfelagsskapinum, kunnu, sum eg fyrr havi víst á, ikki hava ambassadur aðrastaðni. Ongin – heldur ikki Ísland – hevði viðurkent eina føroyska pseudoambassadu. Í setningunum er eisini undirforstaðið, at íslendingar fara at opna eina sendistovu (ambassadu) í Fútastovu. Tað passar heldur ikki. Tað ber ikki til eftir galdandi reglum. Ísland fer at hava eitt generalkonsulat har. Og tað er púra í ordan, eftir galdandi reglum.
3. Síðsti setningur er supertendensiøsur. Journalisturin letur tað ljóða, sum har fer okkurt maktmisbrúk fram frá danskari síðu. At danska flaggið skal hanga uppiyvir einari føroyskari ambassadu. Hatta er tvætl. Ella heldur maktmisbrúk og manipulatión frá sjónvarpsins síðu!

**Ósømilig háðan av Løgmanni og Statsministara**

Poul Mohr, íslendskur konsul (ikki ambassadørur ella sendiharri) fortelir millum annað um, at hann meinar, at íslendingar eru teir einastu í verðini "**sum virða okkum sum tjóð.**" Hetta er ein merkiligur og púra ósannur pástandur. So kemur hann (íslendski konsulin) við ymsum háðandi viðmerkingum um Føroya løgmann.

Millum annað hetta**: *"Kemur Jóannes Eidesgaard til Keypmannahavnar, so smekkar hann (tað er Fogh, statsministari) hurðina aftur í nøsina á honum… hann (JE) kemur aftur sum av torvheiðum. Nei, í Íslandi verður hann móttikin sum forsetisráðharri hjá einari frí … frælsari tjóð"*** (Teljarin á Svf-netútgávuni stendur her á 29.19). Hetta ein søga, sum einki hald hevur í veruleikanum. Eitt fantasi-fostur ella reinur heilaspuni. Men hetta er samstundis ein álvarslig háðan av bæði Føroya Løgmanni og Statsministaranum Anders Fogh Rasmussen.

**Journalisturin bergtikin av mytum og propagandu**

Øllum hesum gloypir ein mikrofonhaldari hjá Sjónvarpinum. Og spyr so út í bláa luft:

***"Nøkur góð ráð?"***

Nú er maðurin bergtikin av øllum tí nationala møsninum hjá Poul Mohr og vil hava meira.

Ja, Poul svarar, at Jóannes Eidesgaard "***bara skal vera djarvur!" -*** og fara í egna sendistovu og ikki hava ***"danabrókina***" við. Aftur eitt spottandi orð um flaggið hjá tí stati, har hann sjálvur fungerar sum konsul, umboðandi Ísland. Dannebrog merkir aldeilis einki har á leið, dana-brók?. Fyrsta stavilsi dannebeskrivar ein lit, eins og 'tan' á eingilskum merkir ljósabrúnur ella reyðbrúnur. Sama 'tan' sum sagnorð merkir at garva, so at skinnið fær ein reydligan lit. Dannebrog merkir í sínum uppruna: eitt reyðlitt plagg, klæðnastykki. At tað plattýska 'brok' hevur sama etymologiska uppruna sum brók er so nakað annað.

**Journalistur leggur upp til sjálvtekt**

Men mikrofonhaldarin hjá sjónvarpinum frøist og er hugagóður:

***"Tað er kanska tað hann skuldi gjørt? Bara hongt Merkið upp og sett veðraskjøldurin á. Og so einki annað?"*** Sigur maðurin ikki, at tað er í lagi at inna sjálvtekt? Íslendski konsulin Poul Mohr heldur fram, tileggjaður av sjónvarpinum:

***"Og so latið hinar komið og tikið tað niður!"***

**Studentaflaggið var ikki viðurkent av nøkrum, heldur ikki Føroya løgtingi**

Ja, hatta var gloypubiti.. So kemur øll mytan um Stauning á Tingvøllum í 1930 og føroyska studentaflaggið, sum ikki var viðurkent av nøkrum. Fyrst klutraðu íslendsku vertirnir, og heysaðu tað litauiska flaggið upp í staðin fyri Dannebrog. So kom eitt ikki-autoriserað studentaflagg upp, og ikki løgtingsflaggið, sum var veðramerki. Ei dáni í, at fólk undraðust, og fýltust á íslendsku fyrireikingina.

Og nú skal journalisturin frá Sjónvarpi Føroya taka samanum og koma til eina niðurstøðu: ***"So tað er eitt afturstig frá 1930, tá vit bóru Merkið fram á Tingvøllum, hetta sum nú hendir?"*** Hatta er eingin reellur spurningur? Hatta er at servera eitt givið svar.

Her leggja Poul Mohr, Sjónvarpið og aðrir við teimum upp til eina planlagda "flagggølu" av veruligum dimensiónum. Hendingin á Tingvøllum fyri fleiri mansaldrum síðani verður sum mjólkavatn afturímóti hesi provokatión.

**Og hvat hendir?**

Eg skilji væl, at íslendski staturin setir ein nýggjan generalkonsul, sum dugir tær diplomatisku reglurnar og at umboða sítt land á tignaligan hátt.

Men eg skilji ikki rolluna hjá Sjónvarpinum. Ella skal man skilja hana allíkavæl?

Tó, Landsstýrið hevur eisini lagt upp til forvirring og stríð. Teir vita væl, at føroyska"sendistovan" ikki er nøkur ambassada. Men teir kalla tað bara "sendistovu" allíkavæl. Hetta er sum at spæla fólk í húsi.

11. marts 2007

# Aftursvar til Rolf, fyrrverandi lektara við Københavns Universitet

POUL MOHR



Rolf, tú mátti minst, sum smádrongur í grannalagnum, at eg eri harðmæltur.

Harra fyrrverandi lektari, eg taki tað sum eitt herðaklapp at verða hartaður av tær..

Tú skrivar, at tað ljóðaði sum um Poul Mohr úttalaði seg í sjónvarpinum vegna »Íslendska statin«. Tað var tað einasta, sum eg iðraði meg um aftaná samrøðuna, at eg ikki segði, at eg ikki úttalaði meg sum umboð fyri Ísland. Annars var alt hitt, sum eg segði, mín hjartans meining: Tað ber kki til at seta føroyska sendistovu á stovn í Íslandi, uttan undir føroyskum flaggi og ongum øðrum. Hesum eru helst flest allir føroyingar samdir við mær í, uttan mun til flokslit. So kanst tú kalla meg og aðrar fundamentalistar so galið tú vilt.

Eg eri bangin fyri, at fyrrverandi lektarin við Københavns Universitet, sum hevur búð í Danmark í umleið 50 ár av lívi sínum, kennir alt ov lítið, fyri ikki at siga einki, til tað samskifti, sum er og hevur verið millum íslendingar og føroyingar, bæði nú og langt aftur í tíðina, ella ta virðing, sum íslendingar hava fyri føroyingum í dagliga lívinum.

Tað verður ein tungur burður fyri okkara sendiharra at samleikagera seg fyri íslendingum undir danska flagginum. Tað verður til óbótaligan skaða fyri føroyingar, sum hava sett virki á stovn – summir stórt virksemi – og fyri allar teir føroyingar, sum búgva í Íslandi. Tað verður trupult hjá teimum at rættvísgera hetta.

»Frítt spæl fyri grovheitum« kallar fyrrverandi lektarin tað, at eg segði, at Ísland er einasta land í heiminum, ið virðir okkum sum tjóð – tað kallar hann »tokusnakk« – aftur eitt dømi um hansara óvitan um viðurskiftini.

Fyrrverandi lektarin sigur, at tað er í lagi, at Ísland setir generalkonsulant á stovn í Føroyum, ístaðin fyri gamla konsulatið. Her kann eg lata hann vita, at síðan 2001 hevur verið íslendskur aðalkonsul í Føroyum, nevniliga Poul Mohr. At íslendingar nú senda ein royndan sendimann til Føroya við serstakari sendistovu, er í fínasta lagi, og hann skal vera hjartaliga vælkomin.

Eg skal lata fyrrverandi lektaran vita, at eg havi fingið nógvar jaligar afturmeldingar frá fólki fyri samrøðuna, eisini frá góðum, gomlum sambandsfólki.

Tað, sum ivaleyst nívir fyrrverandi lektaran inn á sálina og helst hevur gjørt tað, síðan Múrurin fall, og allar hansara ismur: kommunisma, stalinisma, marxisma, leninisma o.s.fr. eru rapaðar, hevur gjørt, at hann hevur mist sín samleika. Tí skal tað nú ganga út yvir frælslyntar føroyingar við øllum vápnum.

Eg sigi sum tað stendur í Høgna tátti:

»Tí svaraði Høgni
Gjúkason,
her elvist ein illur sigur,
leiðist mær nú á
Húnalondum,
at høgga trælir niður«.

# Klaksvík hevur annað uppiborið

NICOLINA DAHL

Ofta verður sagt, at vit hava teir politikarar, vit hava uppiborið, og sjálvandi ber til at siga so, tí vit hava jú sjálv valt teir at umboða okkum á fólkaræðiligan hátt. Tá vit hava sett krossin í atkvøðuklivanum, eru vit leys av borgaraskyldu okkara og vóna tað besta fyri úrslitið. Tó vit kunnu ikki vera trygg fyri, at tey, vit hildu vera best at umboða okkara meining, ikki skifta ham, tá tey eru vald. Mong dømi eru um tað.

Klaksvíkingar hava hvørki verri ella betri politikarar enn øll onnur. Vit mega rokna við, at tey, ið umboða okkum, arbeiða eftir síni sannføring og halda seg gera sítt besta.

Men hóast klaksvíkingar kanska hava uppiborið teir býráðspolitikarar, vit hava, so hevur Klaksvíkin sjálv ikki uppiborið at vera soleiðis viðfarin, sum hon nú verður.

Vágna herjaðu teir á og løgdu doyðin á at oyðileggja so mikið, sum til bar uttan ítøkiligar ætlanir fyri, hvat fór at spyrjast burturúr, og úrslitið liggur sum ein landaskomm.

Men tað var ikki nóg mikið! Nú venda teir eygunum móti Víkini, tí her er framvegis ov vakurt til meirilutan av okkara býráðspolitikarum. Oyðingartrongdin er á teimum, og teir vilja beina fyri vakurleikanum sum skjótast. Teir kalla tað menning og framburð, men hetta er heldur afturstig við lít.

Klaksvík hevur ikki uppiborið politikarar, sum ikki virða søguligu, siðsøguligu og mentanarligu dýrgripirnar her á staðnum.

Klaksvík hevur ikki uppiborið politikarar, sum ikki virða umhvørvið og vakurleikan her á staðnum.

Klaksvík hevur ikki uppiborið politikarar, sum ikki virða trivnaðin, ið liggur í einum grønum fríøki.

Klaksvík hevur ikki uppiborið politikarar, sum vanvirða skapanarverkið.

Nei, Klaksvík hevur ikki uppiborið at vera stýrd av fólki, sum ikki eru góð við býin.

Og tað eru tey ikki, um tey veruliga vilja loyva fyrst einum handilshúsum og síðan høgari bygging á Gerðabø. Teir 15 metrarnir, sum borgarstjórin sigur skulu friðast til tess at ganga okkum á møti, sum vildu havt alt økið friðað, eru í hesum sambandi bæði láturligir og grátuligir. Tí er bara ein einasti bygningur komin har, so er økið spilt, - tá vendist ikki aftur. Tað er útsýnið oman yvir teigalendið, og út yvir Borðoyavík, sum fyrst og fremst er vert at varðveita. Tað er søguliga sambandið millum býlingin Gerðar og dyrkaða lendið.

Tað er bara so syndarligt, at okkara býráð ikki dugir at síggja tað!

Aldagomul søga og aldagamalt strev fara fyri skeytið og tey yppa øksl og kalla tað framburð. Tað er svárt at skula uppliva, at hetta kann fara fram í okkara tíð. Hvar eru friðingarmyndugleikarnir í hesum landi?

Er tað veruliga so galið, at ikki ber til at steðga hesum?

Varðveitið Gerðabø! Friðið hann allan sum hann er NÚ. Tá hava tit álit okkara uppiborið!